# Hvat læra børnini í dagstovnunum?

JÓGVAN PHILBROW
Nevndarlimur, Føroya pedagogfelag



Nógv av kjakinum um forskúlar ber brá av manglandi vitan um, hvat fyriferst á dagstovnum. Summi tykjast enntá geva dagstovnunum skylduna fyri, at børn órógva meira tey fyrstu árini í barnaskúlanum.

Námsfrøðingar eru tó altíð sinnaðir at finna eina loysn, ið tænir barninum best. Og kanska serliga tí eru vit ivandi um júst forskúlaloysnina”. Her tykist tað heldur at vera ein heldur stirvin skúlaskipan ið ikki virkar og ið eini roynd at bøta uppá hana skulu forskúlar gerast. Tað tykist mangan sum um tilmælið frá OECD (Organisation for economic co-operation and development) og øðrum ikki vera sædd. Tí í tí tilmælinum stendur at norðurlendsku »EduCare« (dagstovnar) eru eitt gott boð uppá, hvussu karmarnir um læring kunnu skipast á besta hátt.
Um »vit«, í samfelagnum, framhaldandi vilja varðveitta okkara verandi skúlaskipan, so eru eisini aðrir mátar at styrkja skúlabyrjanina. Tí í fleiri førum tykist tað sum um øll sum eru um børnini tala hvør sítt mál – a la Bábelstornseffektin. Á ein ella annan hátt mugu vit, námsfrøðingar, lærarar og ikki minst foreldur koma ásamt um hvat hugtakið »skúlabúgvin« er, tí sum er tykist tað at vera ein av orsøkunum til henda afturvendandi forskúlatørvin. So kjakið um forskúlar ella ikki átti fyrst at verði ein avkláring av hvat tað merkir at verða »skúlabúgvi«.

**Men hvat er tað sum dagstovnar arbeiða við?**
Fyrst og fremst arbeiða dagstovnar eftir grein 2, í dagstovnalógini, har stendur *»§ 2. Endamálið við námsfrøðiliga arbeiðinum á dagstovninum og dagrøktini er:*

*við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling,*

*at menna barnanna andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði,*

*at búgva børnini til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldu í einum fólkaræðisligum samfelag,*

*at menna tey skapandi evnini hjá børnunum við atliti til at styrkja teirra samleika, sjálvsvirði, sjálvskenslu og evni til at taka sær av egnum viðurskiftum á ein friðarligan og samstarvandi hátt,*

*at tryggja børnunum eitt heilsugott og rørsluliga stimbrandi umhvørvi innandura og við uttanumøki, sum hóskar til barnsins aldur og førleika,*

*í samstarvi við heimini at styrkja um barnsins fjølbroyttu menning í tøttum samspæli við náttúruna.«*

Síðani er eisini ein kunngerð, til dagstovnalógina frá 2006 í sigur, at *»§ 3. Dagstovnurin eigur at seta orð á, hvørji námsfrøðilig mál eiga at vera nádd fyri hvønn aldursbólk av børnum, og hvussu hetta skal setast í verk«.*

Hetta hevur viðført at ein ørgrynna av námsætlanum eru gjørdar fyri dagstovnarnar í Føroyum. Flest allar kunnu finnast hjá teimum stovnum, ið hava heimasíður.

Tað er ymiskt hvussu hesar ætlanir eru orðaðar og hvar denturin verður lagdur, men felags fyri allar eru, at tær taka støði í barninum og skapa umstøður, har ið børnini kunnu mennast á best møguligan hátt.

Nútíðar námsfrøðin byggir á tankar um at rúma børnini, síggja møguleikar og skapa umstøður, soleiðis at barni altíð verður sætt, hoyrt og viðurkent sum ein virkin partur av samfelagnum og nærumhvørvinum, við egnum áskoðanum og vilja til at ávirka egna umhvørvið.

Sjálvandi hava dagstovnar sínar trupulleikar. Alt er ikki bert ljósareytt, og stóri trupulleikin kemur serliga til sjóndar við at tað í grundini ikki er tíð at fyrireika tað dagliga arbeiði, sparingar á stovnum gera at teir ikki altíð hava ráð til vikarar um sjúka, avspáking ella annað rakar. Spurningurin er um »forskúlatrupulleikin« ikki hevði verði partvíst loystur við at givið námsfrøðingum møguleikan at tilrættislagt, eftirmett og skipa arbeiði betur við fleiri tímum til stovnarnar øðrvísi skipaðum arbeiðsuppgávum.

Fyri at siga tað við fáum orðum: Børn læra, eisini á dagstovnum. Ja, tað kann altíð gerast betri, tað eru nokk fleiri skipanir ið eru fullkomin. Námsfrøðingar stremba tó eftir at skapa tær best møguligu menningar- og læruumstøðurnar hjá barninum. Námsfrøðingar taka tó støði í barninum og ikki í undirvísingarskipanini, sum man fær varhugan av at alt práti um ein forskúla ger.

# Leggið Almannastovuna og Nærverkið saman

ANNFINN BREKKSTEIN
starvsnevndarlimur í Sambandsflokkinum



Landið hevur eina sera stóra avbjóðing fyri framman og fyri ikki at enda í álvarsligari kreppu, er neyðugt at taka tøk.

Samstundis sum inntøkur landskassans minka orsaka av heimsumfatandi fíggjarkreppuni, verður hildið á við at útbyggja almennu umsitingina, so at vit eftirhondini hava ein umsitingarligan yvirbygnað, ið als ikki svarar til støddina á samfelagnum.

Talið av landsstýrisfólkum og ráðum bara hækkar, nýggjar almennar umsitingar við stjóra og deildarleiðarum verða stovnaðar uttan at taka fyrilit fyri, um samfelagnum tørvar tænastuna.

Hetta kann ikki halda áfram. Vit vita, at stórir árgangir av borgarum eru á veg út av arbeiðsmarknaðinum, sum koma at seta stór krøv til almannaverkið í komandi árum. Hetta eru vit noydd at fyrihalda okkum til, og laga landsins umsiting hareftir.

Tíðin er komin til, at vit í Føroyum langt um leingi seta okkum niður og gera eina realistiska meting av, hvat okkum tørvar av almennari umsiting og tænastum. Og fyrst av øllum: Hvat fáa vit afturfyri tær ovurstóru upphæddirnar, sum á hvørjum ári verða settar av á fíggjarlógini til almenna umsiting?

Politiska veðurlagið í hesum tíðum bendir alsamt meira á, at fleiri av teimum fólkavaldu politikarunum kenna á sær, at løgtingsval stendur fyri durum, hóast valskeiðið bert er hálvrunnið. Eg spyrji, um tað er rætt, at landspolitikarar skulu brúka orku upp á at føra valstríð og leggja fótonglar fyri hvønn annan, nú í kreppan herjar, ikki bara í Føroyum, men um allan heim?

Nei, takið heldur og brótið upp ermar og komið í gongd við veruligum politisktum arbeiði, ið gagnar! Vit hava eina góða samgongu, við einum skilagóðum samgonguskjali at arbeiða eftir.

Henda samgongan hevur framvegis eina týdningarmikla uppgávu at røkja, og sum skal vera loyst áðrenn næsta løgtingsval, nevniliga at fáa úrslit á borðið, so at ABC-flokkarnir hava nakað ítøkiligt at fara í valstríð við tá valskeiðið er runnið.

Tit kunnu byrja við at leggja tveir stovnar undir almannamálaráðnum saman, nevniliga Nærverkið og Almannastovuna.

Eingin, eg endurtaki, eingin skilagóð ella logisk orsøk er til, at hava tveir stovnar til at loysa uppgávur, ið eru so nær skyldar hvørjum øðrum. Tað er ikki eitt einasta viðskiftafólk undir Nærverkinum, sum ikki eisini er viðskiftafólk hjá Almannastovuni.

Kortini koyra stovnarnir við hvør sínari leiðslu, hvør sínari fíggjarskipan, hvør sínari KT-skipan, hvør sínari journalskipan, hvør sínari starvsfólkadeild. Stutt sagt, púra óneyðugar dupultfunksjónir, ið ikki eru til gagns hvørki fyri samfelagið ella hin einstaka brúkaran.

Áheitan mín til mín kæra floksfelaga, landsstýriskvinnuna í almannamálum Rósu Samuelsen skal tí vera, at bera so í bandið, at farið verður undir at samanrenna hesar báðar almennu stovnarnar sum skjótast.

Við at kóka funkjsónirnar saman, sum í dag verða avgreiddar hvør í sínum lagi á Almannastovuni og Nærverkinum, verður nógv menniskjaligt tilfeingi frígivið, og eg ivist ikki í, at hetta tilfeingið kann verða føroyska samfelagnum til stórt gagn.

Fyri mær at síggja, er Nærverkið ein óyvirskoðilig skipan við einum tungum yvirbygnaði og einari frumskóg av stovnum og heimum undir sær, har trupult, fyri ikki at siga ómøguligt, er hjá uttanfyristandandi – politikarum til dømis – at fáa skil á hvør tekur avgerð vegna hvønn. Almannastovan hevur eina nógv reinari skipan við greiðari leiðslugongd, sum kundi verið ein góð fyrimynd til at fáa eina reinari skipan í tí partinum av almannaverkinum, sum

*Framhald á næstu síðu*

# Aftursvar frá Føroya Skúlabókagrunni til Magna Laksafoss

NIELS PETERSEN
stjóri, Føroya Skúlabókagrunnur



Eftir orðaskiftið í Løgtinginum 11. februar í 2010 verður Magni Laksafoss á Vágaportalinum endurgivin fyri at siga, at hóast Skúlabókagrunnurin prentar nógvar bøkur, so verða tær ikki keyptar ella brúktar, at Skúlabókagrunnurin prentar bøkur í konteynarar og at í miðal verða bara 16 eintøk seld av teimum bókum, sum prentaðar verða.

Harafturat sigur Magni Laksafoss, at kommunurnar vilja ikki keypa bøkur frá Skúlabókagrunninum. Eisini sigur hann, at Skúlabókagrunnurin fær 10 milliónir játtaðar á fíggjarlógini.

**78.582 bøkur til skúlarnar í 2009**
Skúlabókagrunnurin prentar bøkur til skúlarnar. Uppløgini eru prentað til sølu yvir fimm ár, og vísa hagtølini eisini, at uppløgini vanliga verða uppseld eftir fimm árum. Vanliga upplagið er um leið 1200 eintøk av næmingabókum, 3000 eintøk av arbeiðsbókum og 200 eintøk av lærarabókum. Í 2009 vóru útgávurnar 114 í tali. Tað var met.

Í 2009 seldi Skúlabókagrunnurin 74.061 eintøk, ið eru prentað árini 2003-2009. Til samans vórðu seld 78.582 eintøk í 2009. Skilligt er tí, at skúlarnir leggja seg eftir at keypa nýggjasta tilfarið, sum eftir okkara meting eisini er heilt natúrligt.

Játtanin til Skúlabókagrunnin er í 2010 ikki 10 milliónir, sum Magni Laksafoss nevnir, men 5,351 milliónir kr. til bókaútgávu og 1 millión til undirvísingarportalin Snar.

*Dømi um 20 av mest seldu bókunum hjá Føroya Skúlabókagrunni í 2009:*

| Heiti | Søla |
|---|---|
| Hervør og Høgni í triðja, arbh. 2 | 960 |
| Firvaldsbók 6 | 903 |
| Mandy at home, arbh. | 864 |
| Omma blomma Abbi krabbi | 860 |
| Skygni 2B | 856 |
| Skygni 3B | 833 |
| Eg skrivi 1 | 816 |
| Firvaldsbók 4 | 806 |
| Skygni 1B | 795 |
| Eg skrivi 2 | 792 |
| Mandy on holiday, arbh. | 752 |
| Skygni 3A | 745 |
| Eg skrivi 3 | 745 |
| Skygni 1A | 742 |
| Les 3, tekstasavn | 721 |
| Skygni 5 | 713 |
| Hervør og Høgni í triðja, arbh. 1 | 708 |
| Sóljan | 708 |
| Eg skrivi 4 | 707 |
| Firvaldsbók 3 | 707 |

Viðmerkjast skal, at barnagrundarlagið er um leið 750 børn í hvørjum árgangi.

**Sølan setir met í krepputíðum**
Sølan av skúlabókum er vaksin við 5,25% í 2009 í mun til 2008, ið eisini var metár. Vit høvdu ikki roknað við einum vøkstri í søluni, av tí at fíggjarvánirnar vóru so ringar fyri árið 2009 vegna fíggjarkreppuna, sum fer um allan heim.

Tað er ógvuliga hugaligt at síggja, at skúlar og kommunur hóast ringar tíðir hava lagt so stóran dent á at keypa næmingunum nýtt føroyskt undirvísingartilfar.

**Rangar upplýsingar**
Tað er harmiligt, at Magni Laksafoss, formaður í Mentanarnevnd Løgtingsins, kemur við slíkum ósannindum. Føroya Skúlabókagrunnur mælir honum til at kanna upplýsingarnar neyvari næstu ferð. Magni Laksafoss er altíð vælkomin at venda sær til Skúlabókagrunnin, um hann vil hava meiri at vita. Skúlabókagrunnurin hevur ikki latið fíggjarnevndini tær upplýsingar, sum Magni Laksafoss vísir til.